# 9. flokkar í starvsvenjing

**Starvsvenjingin er ein fastur táttur á framhaldsdeildunum í fólkaskúlunum, og tvær tær síðstu vikurnar hava 9. flokkar úr Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum verið í starvsvenjing. Vit hava prátað verið og vitjað í einum bakaríi, í einari frisørsalong, hjá einum málara og hjá tveimum næmingum, sum eru í starvsvenjing sum lærarar.**

STARVSVENJING
*Theresa S. Krogager og Annika S. Olsen*

Av tí at í Kommunuskúlanum eru fýra 9. flokkar og tveir eru í Venjingarskúlanum, vil tað siga, at heili seks 9. flokkar í løtuni eru í starvsvenjing. Tað eru skúlavegleiðararnir, sum finna starvsvenjingarpláss til næmingarnar, men sjálvt um tað hesaferð eru nærum 150 næmingar, sum skulu í starvsvenjing í senn, siga teir seg ikki hava havt nakran stórvegis trupulleika at finna pláss til allar næmingarnar.

- Báðir skúlarnir hava samstarvað, og vit hava deilt plássini soleiðis, at allir næmingarnir skuldu verið nøgdir, sigur skúlavegleiðarin á Venjingarskúlanum, Torfinn Højgaard.

- Tað eru fá arbeiðspláss, ið nokta fyri at hava næmingar í starvsvenjing. Um tey hóast alt gera tað, eru orsøkirnar sum oftast, at arbeiðsplássini ikki hava nóg nógva arbeiðsorku, at tey hava havt so nógvar næmingar í starvsvenjing seinastu tíðina ella okkurt tílíkt, greiðir Torfinn víðari frá.

Hann heldur starvsvenjingina vera gevandi, tí hon gevur ikki bara næminginum ein møguleika at royna seg innan eitt serstakt yrki, hon gevur eisini næminginum innlit í, hvussu starvsfólkið arbeiðir, hvussu samanhaldið á starvsplássinum er, og hvussu starvsplássið virkar sum heild.

- Starvsvenjingin kann eisini ávirka ta útbúgvingarleið, næmingurin fer at velja í framtíðini, sigur Tofinn Højgaard.


*Bogi Magnussen er lærari í Eysturskúlanum*


*Kirstin Joensen hjálpur børnum í Kommunuskúlanum*


*Ann L. Henriksen vaskar hár*

## Rundferð

Í Klaksvík møttu vit Ann, sum er í starvsvenjing á frisørsalongini Vera Klipt, og vit fingu okkum eitt prát við hana.

Ann hevur tey síðstu árini búð í Havn og gongur á Venjingarskúlanum, men áðrenn tað búði hon í Klaksvík. Henni dámar væl at vitja í Klaksvík og at síggja øll tey, hon kennir, aftur, eisini tí hevur hon valt at fara í starvsvenjing har. Í Vera Klipt hevur Ann úr at gera.

- Eg vaski hár, føni hár, slætti hár, blandi hárlitir, geri kaffi, feii og fylli vaskimaskinuna, greiðir Ann frá.

Hon fortelur eisini, at øll á frisørsalongini eru sera vinarlig og fitt, og at henni dámar væl at vera í starvsvenjing har. Harafturat kundi hon í framtíðini hugsað sær at arbeitt innan hetta yrkið.

- Mær dámar væl at seta hár, klippa og tílíkt, so tað kundi væl hent, at eg fari at læra til frisør, sigur Ann.

## Sum lærarar

Í Havn tosaðu vit við tveir næmingar, sum báðir eru í starvsvenjing sum lærarar. Kirstin, ið vanliga gongur á Kommunuskúlanum í Havn sum næmingur, er eisini í starvsvenjing á Kommunuskúlanum. Í hennara føri var hetta ikki nakað, hon sjálv hevði valt, men tá einki annað var møguligt, mátti hon fara har. Hóast tað dámar henni væl. Hon er saman við einum yngri flokki í øllum tímum - ikki einsamøll, men saman við einum lærara.

Bogi, eisini úr Kommunuskúlanum, er í starvsvenjing í Eysturskúlanum. Honum dámar hetta sera væl. Hann hjálpir næmingunum at lesa í tímunum, og tað kemur fyri, at hann eisini skal lesa upp í kristni fyri teimum.

Bæði Kirstin og Bogi møta klokkan 8.00 og fáa frí klokkan 11.20, men hvørgin teirra hevði kunnað hugsað sær eitt starv sum lærari.


*Simona Mikkelsen stendur handan diskin í Drós*

## Í handli

Í Parfumarí Drós er ein annar næmingur í starvsvenjing. Simona, sum gongur á Venjingarskúlanum, stendur handan diskin.

Tað, sum hon í høvuðsheitum ger, er at vaska gólv, støva av og fara ymisk ørindi. Simona lærir eisini um smyrsl og fær ymsar prøvar av vørunum, parfumaríið selur, heim við sær. Henni dámar væl at vera í handli, og hini, sum arbeiða har, eru fitt og hjálpsom.

Simona er tó ikki rættiliga vís í, um hon hevði sæð eina framtíð innan hetta yrkið.

Í SMS eru nógvir næmingar í starvsvenjing. Ein teirra er Bára, sum eisini er úr Venjingarskúlanum. Hon er í starvsvenjing í mótahandlinum Deres. Har stendur hon handan diskin, ruddar, leggur klæði saman og fer við ruski.

- Mær dámar væl, men tað er eitt sindur strævið, sigur hon, og leggur afturat, at starvsfólkini í Deres eru ordiliga fitt.

Hon hevði ikki kunnað hugsað sær eina framtíð innan hetta starvið.

- Nei, at arbeiða í tvær vikur er ivaleyst, heldur Bára.


*Bára Poulsen leggur klæðir saman í Deres*

Í bakarínum hjá Frants Restorff er Óli Jákup úr kommunuskúlanum. Honum dámar væl.

Hann møtir ymsar tíðir. Onkuntíð møtir hann klokkan 5 um morgunin, og aðrar tíðir klokkan 15 seinnapart. Hann arbeiðir umleið 6-8 tímar hvørja ferð.

Í bakarínum ger hann nógv; hann reinsar plátur, ger glasur, tekur úr ovninum, fer út við ruskinum og so framvegis.

Hann hevði ikki viljað verið bakari, men sum starvsvenjing er tað fínt, sigur hann.


*Óli Jákup Jacobsen bakar hjá Frants Restorff*

## Listarlig starvsvenjing

Leikhúsið Gríma í Havn tekur eisini móti næmingum, sum vilja í starvsvenjing. Har hava vit tosað við Marin úr Kommunuskúlanum.

Marini dámar sera væl. Hon sleppur at seyma búnar, gera maskur og dansa. Tað, henni dámar best við hesum staði er, at øll eru so avslappað. Hon møtir hvønn morgun klokkan umleið 10 og sleppur heim um fýratíðina.

Hon hevði kanska kunnað hugsað sær eitt starv innan sjónleikin.

Jóhan Martin, sum gongur á Venjingarskúlanum, dámar væl list, og hann málar eisini dagliga heima hjá sær sjálvum, og tað er ein orsøk til, at hann hevur valt at fara í starvsvenjing hjá listamanninum Torbjørn Olsen. Honum dámar ógvuliga væl.

- Eg læri at gera myndina lívligari, soleiðis at hon er meira hugtakandi at hyggja at. Eisini læri eg, hvussu litirnir skulu setast saman, greiðir Jóhan Martin frá.

Hann heldur list vera áhugaverda, og sigur hann, at hetta møguliga kundi blivið hansara framtíðarstarv.


*Marin Djurhuus dansar, ger maskur og seymar búnar hjá Grímu*

## Lærurikir 14 dagar

Starvsvenjingin hjá 9. floks næmingunum úr Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum endar fríggjadagin 14. februar, og eftir tí, sum vit hava hoyrt, hava teir flestu næmingarnir verið stak væl nøgdir við starvsvenjingartíðina.

Vit vilja við hesum eisini nýta høvið at takka fyri okkara tíð á Sosialinum. Hesar báðar vikurnar hava heilt víst verið sera lærurikar, hugvekjandi og áhugaverdar.


*Jóhan Martin Christiasen dámar væl at mála. Hann er í starvsvenjing hjá Torbjørn Olsen, málara*



# Tríggjar ferðir tríatiára føðingardagur

**Í dag fylla tríburðasystrarnar úr Vestmanna, Joan, Tina og Vivi, 3o ár.
Tær vórðu bornar í heim á Nyborg sjúkrahúsi, tann 15. feburar 1973. Sum vera man, eru nógvar myndir tiknar av teimum upp gjøgnum árini. Sosialurin er sloppin at læna nakrar myndir úr privatu myndamappuni hjá foreldrum teirra**

FØÐINGARDAGUR
*Rúna Sivertsen*

Fyri 30 árum síðani vóru tær á forsíðunum á flestu dagbløðum, bæði her heima og í Danmark. Onkur bløð í grannalondum okkara góvu eisini pláss fyri hesi sjáldsama gleðiligu hending.

Foreldur teirra, Tove Højgaard Madsen og Sámal Jákup Jacobsen, vóru blaðung, bert 17 og 19 ára gomul, tá tey gjørdust foreldur at trimum børnum í einum.

Men tað var eingin forðing, og væl hevur gingist hesum gentum, sum í dag fylla tríati.

Joan eigur 2 børn og Tina og Vivi hvør sín son. Joan býr í Vestmanna, Tina í Havn, og Vivi býr á Frederiksberg í Keypmannahavn.

Sosialurin ynskir teimum trimum og famljum teirra hjartaliga tillukku við stóra degnum.

















